UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsveg 3
100 Tórshavn

Dagfesting: **17. november 2020**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 19/00017-101**

Svar

upp á

fyrispurning nr. 41/2020 frá Bjarna Hammer, løgtingsmanni, viðvíkjandi Skúlaheiminum í Marknagili, settur landsstýrismanninum við uttanríkis- og mentamálum Jenisi av Rana (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvat er langtíðarætlanin við Skúlaheiminum í Marknagili?
2. Nær verða átrokandi ábøturnar gjørdar á Skúlaheiminum?
3. Fara búsitandi á Skúlaheiminum at fáa umstøðurnar aftur, sum eru tiknar frá teimum, eftir at Glasir lat upp?
4. Ætlar landstýrismaðurin at arbeiða fyri, at lærlingar, sum skulu til meginøkið at búgva í lærutíðini í samband við skúlagongdina, fáa avsláttur í leiguni á Skúlaheiminum komandi árini?

Svar

Til 1: Frá byrjan av var skúlaheimið ætlað lærlingum, sum koma frá økjum, har ferðasambandið er ein forðing fyri, at tey kunnu búgva heima. Ásannandi, at ferðasambandið seinastu árini er nógv broytt til tað betra, umframt at broytingar eru fyri framman, er tørvur á, at ein eftirmeting verður gjørd, og at støða verður tikin til, um skúlaheimið framhaldandi skal virka eftir kendu ásetingunum, ella um møguligar broytingar skulu gerast. Hetta er eitt mál, sum verður tikið upp saman við skúlanum.

Til 2: Síðani skúlaheimið varð tikið í nýtslu í 1976, eru neyðugar umvælingar gjørdar uttan- og innandura, men skúlaheimið er ikki høvuðsumvælt. Roynt verður tó allatíðina at fríðka um, og skúlin ger sjálvur viðlíkahaldið, sum verður gjørt innandura.

Tíðarinnar tonn hevur eisini her sett síni merki, og tørvur er í dag á eini grundleggjandi nútímansgerð, sum eisini verður partur av eftirmetingini, sum nevnd er í svarinum til spurning 1.

Til 3: Sambært leiðsluni á Glasir verða uppihaldsstova, kantinan og partvís høli í kjallarahæddini í skúlaheiminum brúkt til undirvísing. Hóast hetta, metir leiðslan á Glasi, at næmingarnir sum heild eru rímiliga væl nøgdir við umstøðurnar í skúlaheiminum. Nýggjur

samskipari í skúlaheiminum er nýliga settur, og saman við honum verður allatíðina arbeitt við at betra um trivnaðin hjá næmingunum, og ábøtur verða gjørdar í tann mun skúlin hevur orku til hetta.

Til 4: Hetta er ikki eitt mál, sum hevur verið viðgjørt áður, men spurningurin verður tó partur av tí eftirmeting av skúlaheiminum, sum verður gjørd.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður